miðvikan
Nr. 104 • 03. juni 2009
Síðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

75 ár síðan Neptun og Nólsoy

# Fór hvønn dag at hyggja eftir pápa og beiggja

**Ein av teimum hart raktu bygdunum í samband við Neptun var Mykines. Vit hava hitt Margreth Hvidtfeldt, sum er ættað úr Mykinesi. Hon misti beiggja sín við Neptun og greiðir frá umstøðunum í Mykinesi um hesa tíðina**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**7. partur**

Við Neptun doyðu átta menn úr Mykinesi umframt ein vestmenningur, sum var ættaður úr bygdini. Tá ið hugsað verður um, hvussu lítil og avbyrgd henda bygdin var, var hetta ein serliga stórur smeitur fyri alt bygdasamfelagið.

Vit hava hitt Margreth Hvidtfeldt í Havn, sum er ættað úr Mykinesi. Hon er fødd í 1920, og hevur tí verið 13-14 ár, tá ið Neptun gekk burtur. Hon minnist hetta væl og dugur væl at greiða frá. Hon hevur greitt frá umstøðunum hesa tíðina og annars um lívið í Mykinesi, tá ið hon var ung.

Hóast Mykines var lítil bygd tá, var hon kortini stór í mun til í dag. Tá búðu um 150 fólk í bygdini, har tað vóru eini 30 hús. Stórt sæð allir menn í arbeiðsførum aldri vóru fiskimenn, so her hevur verið tómligt á sumri.

## Høvdu handil og post

Foreldrini hjá Margreth vóru Anna Elisabeth, kallað Betta, og Jákup í Løðu.

Pápin hevði post og handil. Margret fór ung at arbeiða í handlinum. Her keyptu tey eisini fjøður, sum so varð seld av oynni. Pápin tók eisini eitt skifti móti fiski, men tað var mest, áðrenn Margreth minnist.

Tað var so tungt at fáa vøruna niðan á bakkan, so pápin bygdi eitt pakkhús niðri í fjøruni, so hann kundi fara eftir vøruni, so hvørt brúk var fyri henni. Fiskurin var í síni tíð arbeiddur uppi á bakkanum.

Tað vóru upp til tríggir handlar í Mykinesi. Tað var ofta, at tað ikki var komandi í oynna. Teir syrgdu tí altíð fyri at keypa nógv niðurfyri uppundir veturin, so tað var sjáldan, at tað var nakar serligur vørumangul í Mykinesi.

Tað vóru ikki nógvir pengar millum fólk. Fólk skrivaðu vørurnar, og goldið varð, tá ið avrokningin hjá fiskimonnum kom tvær ferðir árliga.

Fleyging var nógv gjørt av, og tey máttu hava fólk at hjálpa til at royta fuglin. Lønin fyri hetta mundi vera nakrir lundar.

Tey høvdu 2-3 neyt. Av avlopsmjólkini gjørdu tey ost. Tað var eisini nógvur mjólkamatur etin. Kálvarnir vórðu fitaðir til oksar, og tað var ein stórhending, tá ið Smiril kom eftir teimum. Teir fingu sela um seg og vórðu koyrdir á sjógv og síðan hivaðir umborð á Smiril. Mykinesoksar vóru tiltiknir, og teir vórðu sendir til teir stóru handlarnar í Havn sum Smæruna og Karl F. Hetta var eisini høgtíðsdagur í Havn og nógv fólk kom oman á kajuna, tá ið oksarnir komu úr Mykinesi.

Í Mykinesi var eisini neyðugt at fáa mest møguligt burtur úr tí tilfeingi sum var. Tað plagdi at verða sagt, at av seyði varð alt brúkt uttan gallið.

Tað fekst ikki nógvur fiskamatur í Mykinesi. Seiður, sum var vanligasti fiskamatur aðra staðni, fekst ikki í Mykinesi. Men her var afturfyri fuglur. Á sumri var jú fult av fugli ymiskum sløgum, men um veturin var tað havhesturin, sum nógv var til av. Úr havhesti vóru gjørdar frikadellur og eisini forlorin hara.

## Poul lærdi børnini at svimja

Tað vóru um 40 børn í skúlanum



*Margreth misti beiggja við Neptun*



*Foreldrini Betta og Jákup í Løðu*

hesa tíðina. Beiggin Leivur, sum var fýra ár eldri enn Margreth, fór eitt ár ov tíðliga í skúla, so barnatalið kundi koma upp á 40, sum kravdist, um lærarin skuldu fáa løn sum fyrstilærari.

Lærarin var Poul E. Petersen, sum var kendur fyri síni avrik innan ítrótt bæði tá og seinni sum almennur ítróttarráðgevi.

Hann fekk gjørt svimjihyl í bygdini, tískil komu børnini eisini at læra at svimja. Men skil skuldu vera í! Hylurin var býttur í eina deild fyri gentur og eina fyri dreingir. Tað vóru tveir flokkar, og tey gingu í skúla hvønn dag.

Poul og konan gjørdi annars nógv fyri at savna fólkið í bygdini. Hann skipaði millum annað fyri kvøldskúla um veturin. Kona hansara, Elinborg, ættað úr Horni í Havn, skipaði saman við Marin, gift við Jens Paula vitapassaran, fyri kvøldskúla í matgerð.

## At ferðast var ikki bert sum at siga tað

Tað er kent, at ferðasambandið var ringt. Postbátur kom tvær ferðir um vikuna, tað vil siga um líkindi vóru. Men tað kundi vera vikur og mánaðir, serliga á vetri, at einki samband var.

Hesar umstøður kundu tarna fiskimonnum at sleppa avstað og at sleppa heim millum túrar. Tó kundi onkuntíð komast á land ymsa aðra staðni á oynni, sum ættin var til. Til dømis kundi rutubáturin liggja út fyri einum laðbergi norðantil á oynni. Haðani bar til at stjóra førningin upp um upsina við línum og síðan reiða ella bera hann til húsa. Men hetta var sera strævið, og tað kundi eisini vera langt at ganga.

Fyrstu tíðina Margreth minnist bar ikki til hjá postbátinum at leggja at. Tá mátti fólk og førningur rógvast í land við einum 6-mannafari. Men seinni kom ein kaistubbi.

Kona Poul, Elinborg, segði onkuntíð, at tað kendist sum ein høgtíðsdagur, tá posturin kom eftir ikki at hava verið í langa tíð. Hóast bløðini tá vóru gomul, so vóru tey kortini kærkomin lesnaður.

Hesi ringu líkindini at lenda kom ofta illa við hjá útróðrarmonnum. Slapst ikki at í Mykinesi vóru einastu ráðini at fara inn til Sørvágs. Tí gjørdist útróður eisini sera avmarkaður í Mykinesi.

Tað var gott samanhald í bygdini og fólk hjálpti hvørjum øðrum. Eina ferð árliga var neytakonuball, og tá var øll bygdin við. Tey hjá Margreth høvdu eisini neytakonu, sum gekk til neyta fyri tey og fyri fleiri onnur hús eisini. Hon hevði eitt biði í hvørjari hond og eitt á bakinum. Margreth undraðist sum lítil yvir, hvussu neytakonan kundi halda skil á, hvussu nógva mjólk hvørt húski átti. Jú, hon setti eitt merki inni í biðinum, so tað var eingin trupulleiki.

Margreth minnist eisini kirkjugongdina, hvussu kalt tað kundi vera. Men prest sóu tey ikki nógv til. Hann kundi koma, áðrenn skipsmennirnir fóru avstað, og tá teir komu aftur. Hann kom kanska eisini einaferð á sumri. Tá prestur kom hevði hann nóg mikið at gera við at doypa børn og at